tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Yngd:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Meðan Karsten situr á kassanum

### *Oddagrein*

SÍÐANI hetta landsstýrið tók við eru fleiri og fleiri pengar komnir í landskassan, men um somu tíð forfarast fleiri av teimum týdningarmestu og grundleggjandi almennu stovnunum, sum føroyska samfelagið tvs. føroyski skattborgarin hevur brúkt tíggjutals ár at byggja upp. Tað, sum vit hava tikið sum nakað givið, tí vit fegin hava viljað latið skattapengar okkara til tað, nevniliga eitt gott almanna- og heilsuver og eina góða samferðslu er landsstýrið nú við at syndra. Vit endurtaka: um somu tíð sum landskassin fyllist við pengum, verða lívstýðandi almennir stovnar niðurpíndir og syndraðir. Tað sigur heldur ikki so lítið, at fíggjarmálaráðharrin noktar skúlaráðharranum at liva upp til ta lóg teir sjálvir hava samtykt. Vit hava víst á hesi viðurskifti á hesum stað fyrr og hava roynt at rópa varskó, men tað tykist ikki at vera nakað, sum fær landskassaráðharran at rakna við ella innsíggja, hvat tað er fyri kavabólt hann hevur koyrt á rull á almannaøkinum við beinari kós móti avgrundini. Hetta er ikki hørð tala, hetta er tó tann beiski veruleikin.

STØAÐAN á heilsuøkinum er við at gerast sera álvarslig. Og her er greitt, at Landssjúkrahúsið rillar. Heldur niðurpíningin av okkara høvuðssjúkrahúsi fram, so verður tað ikki seinur dagur, at tað ikki vendist við aftur. Landsstýrisfólk yppa øksl og siga, at LS hevur fingið pengar til íløgur. Men hetta bøtir ikki um raksturin. At LS skal virka sum røktarheim um somu tíð, sum hesin lívsneyðugi stovnurin ikki fær nóg nógvar pengar til vanliga raksturin, er eisini fullkomiliga burturvið. Og hvat sigur ábyrgdarpersónurin á økinum! Jú hon yppir eisini øksl. Staðfestir bara at støðan er ring, men kann einki gera við tað, tí ov fá røktarheim eru. Hon hevur onga skjóta loysn á trupulleikanum.Og úti í Tinganesi situr Karsten Hansen so fast á kassanum, at talan verður hvørki um at byggja røktarheim ella lata fleiri pengar til raksturin av LS. Tað sær ikki mætari út enn at fíggjarmálaráðharrin hevur gjørt undirhondsavtalu við Fólkaflokk um at syndra almannaverkið. Um so er, at landsstýrið vitandi leggur hvørkratak um lívstýðandi almennar stovnar fyri at spara upp til fullveldið, so eigur Føroya fólk at fáa hetta at vita. Við slíkum politikki, so setir landsstýrið sjálvt fót fyri sínum fullveldisætlanum. Til fólkaatkvøðuna fer fólkið at staðfesta, at landsstýrið hevur niðurpínt almenna tænastuverkið, og tá verður fullveldið taparin. Tá kunnu vit sanna orðatakið, at man - te. landsstýrið - liggur, sum tað hevur reitt.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Neyðtikin av Ekstablaðnum

Tað skal beinan vegin vera sligið fast, at eg ikki standi inni fyri einum einasta orði, eg í fríggjadagsútgávuni av Ekstrablaðnum eri endurgivin fyri at siga um rúsdrekkaávirkaðar politikarar í Føroyum.

Tað er rætt, at Carl Johan Albrechtsen frá Ekstrablaðnum ringdi til mín hósdagin. Men tað er ikki rætt, at hann hevur ført samrøðu við meg til blað sítt.

Blaðmaðurin frá Ekstrablaðnum hevði hoyrt, at eg, eins og onnur fjølmiðlafólk í Føroyum, hevði viðgjørt orðaða rúsdrekkapolitikkin hjá Tjóðveldisflokkinum, og bað hann meg senda sær greinina gjøgnum faksið.

At senda blaðmanni á donskum blað eina grein úr okkara blað, sum hevur verið á prenti, helt eg vera púra náttútligt. Men tað var ikki í mínum tonkum, at avleiðingin fór at verða ein so ósaklig og følsk grein, sum



tann, Ekstrablaðið hevur prentað.

Eitt dømi um, hvussu ósakliga málið er viðgjørt er, at blaðmaðurin kallar meg fyri redaktør på avisen. Hevði hann tosað við meg í meira enn tveir minuttir, hevði hann vitað, at hetta ikki var rætt.

Sosialurin ætlar sær framhaldandi at viðgera fullveldismálið opið og óheft, hóast Ekstrablaðið ber boð um nakað annað.

**John Johannessen,**
**blaðmaður á Sosialinum**

# Opið bræv til øll foreldur í Føroyum

Ein partur av føroysku fólkaskúlalærarum eru farnir í arbeiðssteðg. Á fleiri skúlum valdar ruðuleiki.

Nú er skjótt eitt ár frálíðið, síðan vit ávaraðu myndugleikarnar um, at játtaðu teir ikki pening til at fremja nýggju fólkaskúlalógina í verki, so fóru vit í arbeiðssteðg.

31. sept. í fjør gjørdu vit eina semju fyri at geva myndugleikunum enn ein møguleika at umhugsa seg. Vit krevja ikki, at fólkaskúlalærararnir skulu hava meira í løn enn hini á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum fingu 6,5% í lønarhækking fyri tvey ár.

Men, tað vit krevja er, at politikararnir halda nýggju fólkaskúlalógina. Vit krevja, at teir skulu geva lærarunum ein møguleika at fremja hana í verki. Hendan lóg hevur álagt lærarunum hópin meira arbeiði. Arbeiði, ið als ikki kann fremjast innan verandi karmar.

Tað eru børnini vit stríðast fyri. Vit stríðast fyri at lógin, sum eftir ætlan skal geva okkara børnum og ungu eina nýmótans útbúgving, skal virka, og gerst tað bert, um tíð verður sett av til nýggju uppgávurnar. Foreldur og lærarar mugu saman fáa politikararnar at skilja, at tað ikki ber til at fáa hesa lógina at virka, um tíð og peningur ikki fylgir við.

Tá fólkaskúlalógin var framløgd fyri tingið, vístu bæði Føroya Lærarafelag og fleiri skúlanevndir, m.a. tann í Havn, á, at lógin fór at verða dýr at fremja í verki, men tað var sum at sletta vatn á gás.

Føroya Lærarafelag heitir tí á øll foerldur um at stuðla lærarunum í at geva børnunum ein dygdar skúla, sum



ikki smæðist burtur millum teir í okkara grannalondum.

**Føroya Lærarafelag**
**Elsa Birgitta P. Petersen**

# Undirvísingartíðin hjá lærarum

Sambært útvarpi Føroya pástendur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, at um lærarar fara ein tíma niður í undirvísingartíð, eru føroyskir lærarar teir av lærarum í norðanlondun, ið fáa stytstu undirvísingartíð-(pultstímar).

Hetta er ein pástandur, sum fíggjarmálaráðharrin eigur at prógva! Hvussu nógv er meðal undirvísingartíðin hjá lærarum í hinum norðanlondunum?

Fyri nærum tveimum árum síðan fingu vit eina nýggja fólkaskúlalóg. Lóg-



in er meinlík donsku lógini, og har vita vit, at lógin hevði stórar broytingar við sær innan skúlagátt — og kostaði nógvan pening at fáa setta í verk. Í Føroyum halda vit, at vit kunnu fylgja við gongdini í okkara grannalondum uttan, at tað skal kosta nakað. Her mugu okkara landsins kostnu menn ásanna, at skulu vit seta arbeiðsplássum nýggj tíðarkrevjandi krøv, má tíð fylgja við — hetta er eisini galdandi innan landsins størsta arbeiðspláss, fólkaskúlan.(Her er tíðarkravið entá lógarkravt)

Nýggja fólkaskúlalógin er eftir mínum tykki góð, og hóskar væl til rákið, sum er innan skúlan kring allan heimin. Skúli og skúlaskapur eru partar, ið siga nakað um støði í samfelagsmenningini. Hvør minnist ikki rokið, sum stóst av kanningini, sum segði, at danskir skúlanæmingar vóru nakrir ar vánaligastu lesarum í Europa?

Skúlalógin ásetur lærarum og skúlaleiðarum nýggjar uppgávur, sum ikki er undirvísing, men **samstarv, ráðgeving og ikki minst menning**, og hvør kann ikki taka undir við slíkum, hetta eru rák, ið allir samfelagsstattir eru við í.

Vit mugu, og tá serliga um vit ætla okkum at verða sjálvstøðugt land, gera okkum greitt, hvat vit vilja við fólkaskúlanum — okkara felags framtíð at frama.

**Torfinn Højgaard, lærari**

†

Okkara høgt elskaða dóttir

**SÚSANNA JAKOBA JÓHANNA HANSEN**
Tvøroyri

varð kallað heim til Harran hósmorgunin 9. mars, 19 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju sunnudagin kl. 13.

Tey, sum vilja minnast Súsannu við blómum ella kransum, verða heldur biðin um at lata eina pengagávu til ungdómsarbeiðið hjá Kirkjuligu Heimamissiónini – konto nr. 422753-2 í Føroya Banka.

**Marna og Karl**

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum, ið mintust meg og familjuna á 80 ára føðingardegnum 13.2.2000.

**Blíðar heilsanir**
**Eivind Gudmundsen**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á 90 ára degnum tann 7. februar 2000, takki eg hjartaliga.

**Joen Davidsen**
**Elduvík**





*Svartabók hevur brádliga fingið ógvuliga týðandi leiklut í fullveldismálinum. Útrokningar, ið eru bygdar á part av niðurstøðuni í hernaðarfrágreiðingini, vísa, at danir hava spart 90 milliardir í verjuútreiðslum orsakað av ríkisfelagsskapinum*
**Mynd: jens Kristian vang**

# Danir spart 90 milliardir í verjuútreiðslum

*Fyri at lata Nato ráða yvir landaøkjum í Føroyum og í Grønlandi, hevur danski staturin síðani 1976 spart næstan 90 milliardir í verjuútreiðslum*

JOHN JOHANNESSEN

Svartabók hevur alt í einum, við síðuna av Hvítubók, fingið ein týðandi leiklut í fullveldismálinum.

Í niðurstøðuni í Svøtubók stendur, at Føroyar í NATO høpi fyri danir høvdu bæði hernaðarligan og fíggjarligan áhuga.

Hesa niðurstøðu hevur landsstýrið kannað nærri í sambandi við fullveldismálið og funnið sær ein trumf, tað kann nýta móti dønum í ríkisrættarligu samráðingunum.

Úrslitið av hesari kanning varð kunngjørt fyri fjølmiðlunum á tíðindafundi um fullveldismálið í Tinganesi fríggjamorgunin.

Stóri trumfurin er, at tá ríkisveitingarnar til Grønland og Føroyar eru drignar frá teimum 90 milliardunum, staturin í verjuhøpi hevur spart, orsakað av ríkisfelagsskapinum, er avlopið hjá statinum kortini knappar 30 milliardir krónur.

### Seinasti møguleiki

Hóast landsstýrið hevur hendan trumf, vísir tað staðiliga á, at hann ikki fer at verða nýttur at duka danir í høvdi við undir ríkisrættarligu samráðingunum.

– Vit vænta opnar og siðiligar samráðingar, sum í staðin fyri at líta aftureftir líta frameftir. Tí fara vit ikki at tveita hesi tøl á borðið framman fyri dønum og siga, at teir hava vunnið meira enn vit í ríkisfelagsskapinum, sigur Anfinn Kalsberg.

Bæði løgmaður og varaløgmaður siga, at kannigin er gjørd fyri, at tað ikki skal koma upp á tal, at landsstýrið fer til Danmarkar á biddaraferð, tá farið verður undir ríkisrættarligu samráðingarnar.

– Tilmælið frá Sambandsflokkinum sigur, at ætlanin hjá okkum minnir um eina biddaraferð til Danmarkar. Hetta haldi eg vera ógvuliga keðiligt, tí tað kann fáa danir at halda tað sama. Men gera teir tað, hava vit hesi tøl, sum prógv fyri tað øvugta, sigur løgmaður.

Høgni Hoydal vísir samstundis á, at ríkisfelagsskapurin hevur givið báðum pørtum í hvør sínum lagi.

### Dagførdar útrokningar

Tá sagt verður, at talan er um 90 milliónir, danski staturin hevur spart, er ikki talan um heilt reel tøl, men um dagførdar útrokningar.

Embætismenn hava umroknað sparda peningin fyri hvørt einstakt ár síðani 1976 til tað virði, krónan hevur í dag. Teir hava sett indekstalið fyri 1999 at vera 100, og síðani eru indekstøl svarandi til virðið á krónuni fyri hini árini sett fyri hvørt einstakt ár. Til dømis er indekstalið í 1976 33.

Síggja vit burtur frá umrokningunum hjá føroysku embætismonnunum, hevur staturin spart knappar 53 milliónir í verjuútreiðslum av ríkisfelagsskapinum. Verður ríkisveitingin drigin frá, er talan um eina upphædd á góðar 18 milliardir krónur.

NATO limaskapur krevur eitt gjald á 3 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni hjá Danmark. Men øll hesi árini hava danir bert rindað eitt gjald á umleið 2 prosent. Orsøkin til hetta er ríkisfelagsskapurin.



*Jonhard Eliasen, búskaparfrøðingur, hevur staðið fyri útrokningunum*
**Mynd: jens Kristian vang**

